gult12 cyan12 magenta12 svart12

FISKIVINNUTÍÐINDI

Gólvsølan 9. apríl

138 bátar seldur góð 92 tons vórðu seld um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum mánadagin. Av yvirlitinum niðanfyri framgongur, hvussu nógv einstøku bátarnir avriddur, eins og býti av samlaðu veiðuni framgongur

Sýslunummar	Skipanavn	reiðskapur	kilo
0	Ikki Skrásett Før	snella	31
FD 112	Barmur	snella	261
FD 123	Riddarin	snella	334
FD 124	Múlatindur	snella	143
FD 131	Høghamar	snella	103
FD 174	Silver Belle	snella	266
FD 176	Helen	lína	791
FD 229	Camilla	snella	295
FD 25	Mascot	lína	623
FD 250	Halgerð	lína	408
FD 267	Súlan	snella	57
FD 340	Løkur	snella	154
FD 348	Skoratindur	snella	945
FD 359	Nýsan	snella	327
FD 363	Knúkur	snella	327
FD 390	Elisabeth	snella	410
FD 398	Havrenningur	snella	287
FD 420	Reynir	snella	784
FD 421	Hjallur	snella	285
FD 428	Margit J	lína	152
FD 492	Klettur	lína	422
FD 530	Norðsøki	lína	1.962
FD 557	Fiskivarði	lína	5.055
FD 580	Thomas Nygaard	lína	596
FD 585	Høgaleitið	snella	221
FD 612	Knørrur	snella	110
FD 67	Huldusteinur	snella	70
FD 68	Royndin Fríða	snella	214
FD 718	Lágin	snella	108
FD 750	Brimnes	snella	117
FD 753	Maria	lína	55
FD 775	Langanes	snella	153
FD 783	Glúpur	lína	1.934
FD 812	Geirhólmur	lína	1.005
FD 855	Lómur M/B	snella	213
FD 863	Heidi	snella	44
FD 900	Høvnin	lína	1.214
FD 905	Trúgvi	lína	788
FD 954	Vørðan	snella	257
FD 956	Anja	snella	108
FD 981	Másin	snella	174
FD1116	Frida	snella	472
FD1142	Durita	snella	120
KG 22	Hilda	snella	62
KG 125	Bjarnaberg	snella	43
KG 170	Eljan	snella	579
KG 248	Sjósteinur	snella	197
KG 32	Kristian Í Vági	snella	25
KG 464	Havnatindur	snella	427
KG 47	Havsbrún	lína	2.428
KG 471	Ørnin	snella	108
KG 476	Pison	lína	739
KG 477	Kvikk	lína	752
KG 514	Dúgvan	snella	175
KG 561	Fagriklettur	lína	305
KG 640	Hansa	snella	613
KG 642	Bragd	lína	4.840
KG 661	Rýpan	snella	78
KG 666	Sjóvarfossur	snella	368
KG 7	Jákup B	lína	2.878
KG 744	Osla	lína	6.979
KG 748	Havørnin	snella	455
KG 832	Borgin	snella	666
KG 92	Øldan	snella	136
SA 110	Netjan	snella	137
TG 10	Evi	snella	611
TG 103	Lómurin	snella	177
TG 159	Vesturbúgvin	snella	817
TG 26	Majbritt	snella	485
TG 283	Herdis	snella	750
TG 339	Báran	snella	300
TG 349	Trý Drangur	snella	2.324
TG 395	Vima B	snella	477
TG 40	Kambur	snella	1.527
TG 401	Barbara	snella	350
TG 435	Jórun	snella	419
TG 471	Núpur	snella	633
TG 55	Bláaberg	snella	541
TG 562	Todnes	snella	165
TG 597	Torstein	snella	321
TG 60	Sjófarið	snella	1.269
TG 631	Skarstein	snella	1.260
TG 650	Nípan	snella	306
TG 670	Víkaberg	snella	1.050
TG 731	Annie M/B	snella	358
TG 744	Marjun	snella	1.339
TG 797	Norðfarið	snella	834
TG 808	Poul S.	snella	1.033
TG 91	Stjørnan	snella	324
TN 288	Inga Mareta	snella	323
TN 325	Rádni	snella	78
TN 381	Sancy	snella	702
TN 483	Ægir	lína	3.907
TN 718	Hvítaberg	snella	260
TN 753	Tóra	lína	1.467
TN 805	Anna	snella	58
TN 919	Morgunroðin	snella	651
TN 964	Hvítifossur	snella	123
TN1018	Valkyrie	snella	97
TN1053	Kjógvin	snella	234
VA 109	Ella	snella	683
VA 125	Líraberg	snella	880
VA 141	Álkuklettur M/B	snella	568
VA 164	Niklái	snella	654
VA 165	Fríða	snella	127
VA 188	Helena	snella	156
VA 190	Sjóberið	snella	422
VA 202	Jenny D	snella	230
VA 213	Leitistangi	snella	532
VA 221	Carina	snella	377
VA 242	Suðurfarið	snella	483
VA 251	Elvira M/B	snella	481
VA 268	Andrias Á Túala	snella	103
VA 269	Anna Maria M/B	snella	1.127
VA 270	Håbet	snella	168
VA 28	Álitið	snella	1.681
VA 287	Sólvá	snella	340
VA 294	Nestangi	snella	596
VA 295	Thova	snella	790
VA 300	Cemary M/B	snella	169
VA 304	Jóngerð	snella	440
VA 310	Streymnes	snella	171
VA 324	Skarvur	snella	1.621
VA 327	Fortuna M/B	snella	775
VA 34	Dunga Hans M/B	snella	754
VA 350	Sirið	snella	1.001
VA 50	Tøðubóndin	snella	155
VA 60	Dáva Dánjal	snella	787
VA 717	Stíganes	snella	224
VA 81	Gutta Jógvan	snella	586
VA 82	Raðnes	snella	177
VA 9	Líðartangi	snella	381
VN 121	Sjódrangur	snella	393
VN 168	Vitin	snella	334
VN 211	Helgi	snella	903
VN 350	Terjá	snella	442
VN 408	Jónvør	snella	1.885
VN 425	Halla	snella	335

Vørunavn	kilo
Brosma 0	714
Brosma 2	65
Brosma 3&4	845
Hýsa 0	39
Hýsa 1	1.877
Hýsa 2	3.082
Hýsa 3	4.162
Hýsa 4	242
Havtaska 0	259
Hvítingur 0	3.785
Kalvi 2	94
Kalvi 4	64
Kongafiskur 0	256
Kongafiskur 3	5
Longa 0	317
Longa 1	382
Longa 2	424
Longa 3	132
Longa 4&5	67
Reyðsprøka 0	150
Skøta	64
Skrubba	52
Steinbítur	1.260
Toskarogn	1.511
Toskur 1	947
Toskur 2	5.985
Toskur 3	29.349
Toskur 4	24.504
Toskur 5	8.673
Upsi 0	1.922
Upsi 1	28
Upsi 2	881
Upsi 3	726
Upsi 4	2
Upsi 5	21

Trolararnir hjá Mortan í Irmingarhavið

Justinus Leivsson
Eidesgaard

Ljósafellið hevur ligið seinstu tíðuna. Teir hava tikið ein ljósmotor í botn og roknað veður við einar 10 arbeiðsdagar afturat, áðrenn hann loysir. Ætlanin er at fara í Irmingarhavið at royna eftir kongafiski.

Enniberg kom aftur úr Bretlandi í seinastu viku, har teir hava lagt veiðuna upp frá seinasta túrinum í Barentshavinum. Teir høvdu góð 500 tons av lidnari vøru inni. Enniberg fer í kvøld nýggja túr. Teir fara eisini í Irmingarhavið eftir kongafiski.

Enniberg fer ikki aftur í Barentshavið fyrr enn í summar í juni/juli, tá toskurin hevur flutt seg eystur í russiskan sjógv. Irmingarhavið eru havleiðirnar suður út Reykjanesi og eystur av landsynningspartinum av grønlendska landgrunninum uttanfyri 200 fjórðinga markið. Nógv skip royna á leiðini, serliga íslendsk, skip úr baltisku londunum, norðmenn og russar.

gult13 cyan13 magenta13 svart13

300 krónur fyri at sova um Suðuroyarfjørð

Ert tú ringur í sjóverki, mást tú rinda 300 krónur umframt vanliga ferðaseðilin fyri at fáa koyggju umborð á Smyrli teir báðar tímarnar, ferðin varir. Fyrr var kostnaðurin 70 krónur

ØKISMENNING
John Johannessen

Prísurin á eini koyggju umborð á Smyrli um Suðuroyarfjørð er hækkaður við 328,7 prosentum, úr 70 krónum upp í 300 krónur

Um somu tíð, sum álitið um at menna útjaðaran varð handað landsstýrinum, hækkaði prísurin at leiga eina koyggju um Suðuroyarfjørð við 328,6 prosentum.

Tað kann vera rættuliga baldrut at sigla um Suðuroyarfjørð. Og fyri at gera túrin eitt sindur frægari hjá teimum, ið eru ring av sjóverki ella hava børn, hevur tað verið møguligt at leiga sær eitt lítið kamar við einari uppreiddari koyggju fyri 70 krónur.

Men nú hevur Strandfaraskip Landsins brádliga gjørt av at hækka prísin upp í 300 krónur.

Øsir Suðuroyingar

Tað kemur ofta fyri, at fólk ynskja at fáa koyggju umborð á Smyrli, tá veðrið er vánaligt. Tí kemur tað illa við hjá Suðuroyingum, at prísurin fyri koyggjuna er hækkaður so nógv.

Suðuroyingar eru so mikið ónøgdir við príshækkanina, at Hergeir Nielsen, sum er valdur á ting í Suðuroynni fyri Tjóðveldisflokkin, hevur sett landsstýrismanninum í vinnumálum skrivligan fyrispurning um hetta.

Hergeir Nielsen spyr, um landsstýrismaðurin, Bjarni Djurholm, fer at leggja prísbygnaðin hjá Strandfaraskipum Landsins til løgtingsins viðgerð.

Suðuroyartingmaðurin vísir á, at vinnunevndin í sambandi við viðgerðina av einum uppskoti hjá Sambandsflokkinum um at áseta sama prís á øllum farleiðum hevur sagt, at Strandfaraskip Landsins arbeiðir við nýggjum prísbygnaði.

– Samstundis hevur Strandfaraskip Landsins hækkað koyggjuprísin umborð á Smyrli úr 70 krónum upp í 300. Væntandi er, at hetta verður leisturin fyri nýggju prísskipanini, og landsstýrismaðurin veit, at hendan prísøking, ið hann varðir av, ikki eigur undirtøku á tingi, vísir Hergeir Nielsen á í viðmerkingunum til fyrispurningin.

Fleiri orsøkir

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfaraskipum Landsins, sigur fleiri orsøkir vera til, at prísurin á koyggjunum er hækkaður. Ein av orsøkunum er, at felagið roynir at fyribyrgja, at skipið ikki verður sorað sundur.

– Tú kanst hugsa tær tá ein riðil av ungdómi leigar kamar fyri 70 krónur og brennir tað við sigarettum, knúsar vaskið og annars raserar alt kamarið. Tá loysir tað seg ikki at halda prísin á 70 krónum. Tískil liggur ein fyribyrging í, at prísurin er hækkaður.

Men Reidar Nónfjall vísir eisini á aðrar orsøkir.

– Vit skulu reka hesa fyritøkuna eftir vinnuligum fortreytum. Tað kostar at vaska seingjaklæði og annars halda kømurini. Tí var neyðugt at seta prísin upp.

Stjórin á Strandfaraskipum Landsins vísir í hesum sambandi á, at felagið hevur gjørt klivar við sofum umborð á Smyrli, har tað væl ber til at sova, um tú ert ringur í sjóverki.

Tað ber eisini til at leiga kamar umborð á Smyrli fyri eina nátt, um tú ert handilsferð í Suðuroynni. Hetta kostar somuleiðis 300 krónur.

– Seingjaklæðini skulu jú vaskast, líkamikið um onkur hevur sovið í teimum hálvanannan tíma ella átta tímar, vísir Reidar Nónfjall á.

Annars heldur Reidar Nónfjall tað vera smálutir at tosa um koyggjuprís. Hann heldur, at tað í staðin eigur at verða tosað um at gera nýggja Suðuroyarskipið.

Zabian Zoul komu ikki víðari

Bólkurin við tónleikinum hjá Eyðfinni Jensen kom ikki víðari í Grand Prix kappingini fyri ung í DR1 leygarkvøldið

TÓNLEIKAKAPPING
Eirikur Lindenskov

Charlotte saman við einum av dómarunum, tí kenda rasarakoyraranum Jason Watt

Zabian Zoul, bólkurin við teimum báðum 15 ára gomlu Charlotte og Ercan, ið Eyðfinn Jensen úr Havn hevur hjálpt við tónleikinum, vann ikki barna- og ungdóms Grand Prix kappingina í DR1 leygarkvøldið.

– Zabian Zoul komu tíverri ikki víðari millum fimm tey bestu, sigur Eyðfinn Jensen. Tann, ið vann kappingina var Sisse, og sleppur hon at hita upp til veruligu altjóða Melodi Grand Prix, sum verður í ítróttarparkini hin 12. mai.

– Men tað var eitt stórt upplivilsi at vera við, sigur Eyðfinn. Hann heldur, at tað kundi kanska gingið eitt sindur betur á pallinum, tí tey høvdu trupulleikar at hoyra seg sjálvi, og nervarnir gjørdu eisini eitt sindur um seg, sigur hann, men leggur kortini afturat, at hetta helst var galdandi fyri tey flestu.

– Vit vóru sjálvandi skuffað, tá vit fingu boðini, at vit ikki komu víðari, men tað gekk skjótt yvir. Vit hava alla tíðina vitað, at tað kundi fara at ganga so, sigur Eyðfinn Jensen.

Hann leggur tó afturat, at tey við hesum hava fingið nógvar royndir, tey hava møtt nógvum spennandi fólkum, og í tí frálíka ballinum aftan á kappingina komu fleiri av dómarunum og »stjørnunum« til teirra og róstu Zabian Zoul fyri avrikið.

– Zabian Zoul fer avgjørt at halda á fram, so væntandi hoyrist okkurt aftur frá teimum innan leingi, sigur Eyðfinn Jensen.

Tey, ið vilja frætta meira um kappingina kunnu hyggja á heimasíðuna hjá Danmarks Radio: http://esc2001.dr.dk/doc_20_9.html, http://www.dr.dk/oline/grandprix/, http://esc2001.dr.dk/doc_6049.html

Føroyskur laksur er sunnur

Kanningar av føroyskum laksi sýna, at hesin ikki inniheldur nevnivert tungmetallum og heilivágsrestir vóru ikki ávístar.

Avtalan um heilsufrøðilig viðurskifti við ES ásetir, at hvørt ár skulu gerast kanningar av aldum fiski í Føroyum, sum hava til endamáls at skjalprógva, at alifiskur ikki inniheldur ymisk óynskt evni, so sum heilivágsleivdir, tungmetallir, PCB og líknandi umhvørviseitur, vakstrarhorminir, soppaeitur og avlúsingarevni.

Øll ES long øll lond, sum selja á ES marknaðinum, eru undirlødd somu skipan, sum fevnir um øll landbúnaðardjór, og her er alifiskur íroknaður. Seinastu í mars í hvørjum mánaði senda londini sína frágreiðing til ES.

Føroyska kanningarætlanin fyri 2000 fevndi um 70 laksar.Úrslitið av kanningunum vísa, at ongar heilivágsleivdir vóru ávístar í fiskinum. Tungmetalkanningarnar vírsu, at innihaldið av kyksilvur, blýggj og kadmium í føroyska laksinum liggur undir galdandi markvirðir, fyri kyksilvur, sum lá hægst, lá úrslitið 10 ferðir lægri enn loyvda mark.

Kanningar fyri hini óynsktu evnini eru ikki lidnar enn, orsakað av at trupult hevur verið at finna skikkaðar og tøkar starvsstovur til hetta. Væntandi verða úrslitini tør 1. juli og verða tey síðan send ES í einari ískoytisfrágreiðing.

Sýnistøkuætlanin fyri 2001 er løgd til rættis, og tiknir verða umleið 70 laksar og eina 300 royndir verða gjørdar av teimum.